EINGI TILBOÐ TIL BØRN OG UNG Í FØROYUM

Føroyskir ungdómar fara fyri páskir á modellkapping í New York. Íslendski venjari teirra heldur annars, at alt ov fáa tilbo› eru til børn og ung í Føroyum.

Jan Müller

Tann 20. apríl fara 14 føroyskar gentur og ein drongur til amerikanska stórb‡in New York at luttaka í eini stórari altjó›a talent- og modellkapping. Teir 15 føroyingarnir hava í eina tí› vant til stóra frams‡ningartiltaki›. Ta› er íslendska kvinnan Kolbrún A›alsteinsdóttir frá Icelandic Models, sum hevur tiki› stig til føroysku luttøkuna í umrøddu kapping. Hon ver›ur hildin eina fer› um ári› - um páskini - vi› luttøku av børnum og ungdómum úr allari ver›ini, her serstakliga Europa og Australia. Føroysku luttakararnir fer›ast saman vi› teimum íslendsku, i› eru umlei› 50 í tali. Vi› vera so eisini eini fimm til sjey lærarar og fimm foreldur. Í kappingini skulu luttakararnir royna seg á fleiri økjum, eitt nú vísa seg sum modell í serstøkum klæ›um, tey skulu lesa upp og spæla leiklutir osfr. Ein professionellur amerikanskur sjónleikari ver›ur vi› til tiltaki› at meta um n‡ggju talentini og modellini.

Icelanic Models er eitt felag í Íslandi, sum m.a. leggur seg eftir at finna og hjálpa børnum og ungum, sum vilja royna seg í modellver›ini. Ta› setir stór krøv til luttakarnar at vera vi›, eitt nú hør› venjing, sum fer fram í hølunum hjá Yndi og Yviri vi› Strond í Havn.

Íslendska Kolbrún ella Kolla, sum hon vanliga ver›ur nevnd, heldur sjálv, at hetta er eitt einastandandi høvi hjá føroyskum børnum og ungdómum at vísa seg fram. Bara ta› at vera vi› fær mong at kenna seg sum vinnarar. Hon heldur ta› hevur stóran t‡dning, at ein slíkur møguleiki, ja avbjó›ing stendur teimum ungu í bo›i, og her eisini børnum og ungum í Føroyum. Kolla hevur júst veri› í Føroyum og vant føroyska li›i›. Hon kom til Føroya fyri sjey mána›um sí›ani, og heldur hon, at føroysku luttakararnir í venjingunum hava tiki› seg ómetaliga nógv fram.

Kvalitetur

Sjálv heldur Kolla, at ta› er nógvur kvalitetur at finna millum tey ungu í Føroyum, og ta› er sjálvandi eisini tí, at hon er her. Onkrar av gentunum hava longu luttiki› í kappingum í Reykjavík og í London. Tvær gentur vór›u herfyri vi› á eini frams‡ning í Íslandi, har tey sluppu at royna seg saman vi› ungum úr Íslandi. Kolla umhugsar eisini at skipa fyri eini klædnaframs‡ning í Føroyum, so føroysk ung kunnu gera anna› enn at drekka og bara ganga fyri vág og vind, sum hon málber seg.

Hon vil fegin sleppa at gera okkurt fyri børnini og tey ungu í Føroyum, sum hon sjálv heldur í dag púra eru slept uppá fjall. Eingin hugsar um at geva teimum nakrar umstø›ur. Hon vísir á, at ta› ver›ur gjørt nógv meira fyri børn og ung í t.d. Danmark og Íslandi, har tú hevur sokalla› "Youth Stations". Í Føroyum er rætt og slætt einki fyri hesi ungu, og ta› er Kolla sera bilsin av, tá hugsa› ver›ur um kvalitetin, tvs. dygdina og vir›i í teimum ungu, sum finnast her. -Tit føroyingar vita ikki, hvussu nógvan kvalitet tit eiga í hesum ungu.

Kunna um ska›an av drekking og royking

Í Íslandi ver›ur nógv gjørt burtur úr teimum ungu sigur Kolla og vísir á, at modellkappingar ol. fáa sítt besta vi›mæli frá høgtstandandi fólkum í bæ›i undirvísingar- og heilsuverkinum. Hon vísir í hesum sambandi á tey tiltøk, sum ver›a gjørd fyri at kunna um misbrúk bæ›i í sambandi vi› royking og drekking. Kolla sigur seg vera sera vónsviknan av ikki at hava fingi› stu›ul til tiltøkini tey skipa fyri her í Føroyum. Hon var m.a. hjá borgarstjóranum í Havn, men har var› eingin áhugi sigur hon. Sí›ani tá hevur hon veri› hjá onkrum oljusamtaki fyri at vita, um áhugi er fyri at stu›la.

Gó›ur filmur

Tá vit spyrja Kollu, hvat foreldur skulu hugsa, eftir at hava sæ› filmin í sjónvarpinum herfyri um børn, sum ver›a misbrúkt í modelver›ini sigur hon, at hetta hevur sjálvandi einki at gera vi› ta› arbei›i› hon tekst vi›.

Hon hevur sæ› filmin um modellbørnini hjá Elite, sum vór›u misbrúkt av nøkrum av oddamonnunum. -Hetta eru perversir menn, og eg eri sera fegin um, at teir eru koyrdir út í myrkri›.

Ta› er gott, at hetta programmi› er gjørt, solei›is at foreldur vita, hvat fyrigongur í pørtum av hesi ver›ini men Kolla leggur tó dent á, at hetta hevur einki at gera vi› tær kappingar, sum tey skipa fyri. Men ta› er sera gott, at alt hetta er komi› fram.

Teir føroysku luttakarnir, sum um stutta tí› fara til New York at luttaka í kapping har, skulu gjalda allar útrei›slurnar sjálvi. Kolla heldur ta› ikki vera órímuligt og spyr, hvussu mong foreldur og ung ikki brúka pengar til at fer›ast til Gran Canaria ol. -Hví tá ikki eisini loyva teimum ungu at royna seg sjálvi í slíkum kappingum.

Kolla ætlar sær ikki at sleppa Føroyum. Hon er sera spent um, hvussu fer at gangast føroysku luttakarunum í New York í apríl, men hon kemur so aftur til Føroya í mai at finna n‡ggj børn og ung til komandi venjingar. Øll kunnu vera vi› í aldrinum millum 13 og 24 ár.